Sagt um hár her og har:

# Gud skapti kvinnuna og mannin, IKKI Gillette!

**Kvinna, 32 ár:** Eg skilji ikki, at vit skulu líkjast 8 ára gomlum í neðra. Sjálvandi hava rættar kvinnur hár millum beinini.

**Kvinna, 32 ár:** Eg rokni við, at tey ungu raka sær, tí tey brúka porno at samanbera seg við, tá tey gerast virkin sexuelt.

**Kvinna, 32 ár:** At leggja seg undir knívin er eitt tekin um, at ungu kvinnurnar ræðast at gerast vaksnar, tí við vaksnatilveruni fylgir eisini ábyrgd og skyldur. Heldur áttu tær at skilt, at ævigur ungdómur er ikki til.

**Maður, 35 ár:** Hárini hava eina funktión. Annars høvdu vit tey ikki. Til dømis at verja slímhinnurnar móti skitti, bakterium og fremmandalikam.

**Kvinna, 42 ár:** Sjálv eri eg púra sløtt. Tað er maður mín eisini. Skilji ikki, hví fólk hava so ilt í reyvini av tí. Tað má vera upp til fólk sjálvi, um tey vilja raka sær ella ikki. Fólk kunnu gera, sum teimum lystir, so leingi ongin annar tekur skaða. Vit eru so ymisk, og tað skulu vit eisini sleppa at vera í neðra.

**Kvinna, 25 ár:** Eg havi ongantíð hár í neðra. Raki mær undir brúsuni og fari til brasilian wax, tá eg eri niðri. Man fær forbanka ilt, men tað heldur leingi.

**Maður í 50'unum:** Kvinnan skal vera mjúk og loðin. Tað er natúrligt og kvinnuligt. Tað hevði verið sum at farið í song við einari smágentu, um hon var púra sløtt.

**Maður, 24 ár:** Eitt loðið lall sær gamaldags út. Nakað sum at fáa hár í matin.

**Maður, 19 ár:** Eg raki alt hárið av kroppinum. Eisini undir hondunum og á bringuni. Tað kennist reinari og lekrari.

**Maður í 50'unum:** Eg havi ongantíð nortið hárið á kroppinum við einum saksi ella rakiblaði.

## Ger soleiðis

① Brúka eitt rakiblað, lunkað vatn og kanska barberskúm.

② Brúka ein elektriskan rakara.

③ Snøgga við einum trimmara.

④ Voksviðgerð uttanlands. Við heitum voksi, har hárini fylgja við, tá voksið verður hálað av. Heldur í umleið tveir mánaðir. Kostar fleiri hundrað krónur.

⑤ Lasaraviðgerð. Ein varandi loysn, har hárrøturnar verða týndar. Kostar fleiri túsund krónur.



### Frisurur



**Brasilianskt**
Alt verður voksað av.



**Amerikanskt**
Duskurin er har, men verður snøggaður við bikinilinjuna og upp móti nalvanum.



**Franskt**
Ein smøl rípa framman.



## Blankar kúlur

Barberingin verður ongantíð tann sama aftur, tá tú hevur brúkt krem frá »Below Your Belt«. Hetta sigur í øllum førum upphavsmaðurin til røðina, Hans Fróði Hansen.

Undan jólum kom fyrrverandi landsliðsleikarin á marknaðin við nýggju røðini til kropsrøkt – serliga millum beinini.

»Below Your Belt« er eitt krem, sum verður nýtt til intimbarbering.

– »Below Your Belt« er til barberingina av tí staðnum, sum eingin tosar um, men sum næstan øll »hampa« um, sigur Hans Fróði Hansen.

Fólk í Føroyum kunnu keypa krem frá »Below Your Belt« til bæði kvinnur og menn á netinum.